KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

# Klaksvíkar Býráð

| | |
|---|---|
| **Dagfesting:** | 28.11.2019 kl. 17:30 |
| **Málnr.:** | 16/01208 Gerðabók |
| Nevndarlimir: | Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen, Gunvá við Keldu, Tummas J. Lervig, Kristian Eli Zachariasen, Óli M. Lassen, Beinta Klakstein, Atli S. Justinussen, Beinir Johannesen, Herfrí J. Sørensen og Steinbjørn O. Jacobsen. |

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til viðgerðar** | | |
| 150/19 | 16/00426-11 | Matr.nr. 16 á Norðoyri - broyting í sundurbýtisætlan |
| 151/19 | 18/00496-63 | Fíggjarætlan 2019, Klaksvíkar Býráð - dagføring (*eykajáttan, fyrra viðgerð*) |
| 152/19 | 19/00892-51 | Fíggjarætlan 2020 - Klaksvíkar Býráð |
| 153/19 | 13/00759-86 | Stuðul til Áhugafelagið Nólsoyar Páll – *eykajáttan. fyrra viðgerð* |

## 150/19
## 16/00426-11 Matr.nr. 16 á Norðoyri - broyting í sundurbýtisætlan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 18.11.2019 | 140/19 |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 28.11.2019 | 150/19 |

**Frágreiðing um málið:**
Klaksvíkar Býráð samtykti 21.04.2016 at viðmæla sundurbýti av matr.nr. 16 á Norðoyri sum víst við bláum á myndini niðanfyri. Málið bleiv sent Umhvørvisstovuni til matrikuleringar, men er ikki avgreitt haðani. Hósdagin 31. oktober var umsøkjarin inni á Teknisku Deild við fráboðan um, at tey nú ynskja at broyta umsóknina til í staðin at umfata sundurbýti part I og part II, sum víst við reyðum á myndini. Ætlanin víst við bláum verður slept.

(Tekniska Fyrisiting er vitandi um tilmælið frá Varðveitingarbólkinum frá 2011-2014 (sí stk.8 í viðfestu s. 22 í álitinum). Umsøkjarin hevur upplýst, at ætlaða nýbyggingin á økinum tekur atlit til endurreistu úthúsini á økinum, sum ætlast varðveitt).

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001




**Lógargrundarlag:**
Matrikullógin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongar – kommunan bert ummælandi partur

**Tilmæli:**
Sundurbýtið er í tráð við ásetingar í Almennu Byggisamtyktini, og mælir Tekniska Fyrisiting tí til at viðmæla.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 18. november 2019**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 11-11-2019.

**Klaksvíkar Býráð 28. november 2019**
Tilmælið frá UBN 18-11-2019 einmælt samtykt.

## 151/19
## 18/00496-63 Fíggjarætlan 2019, Klaksvíkar Býráð - dagføring (*eykajáttan, fyrra viðgerð*)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 26.11.2019 | 125/19 |
| 2 Klaksvíkar Býráð – *fyrra viðgerð* | 28.11.2019 | 151/19 |
| 3 Klaksvíkar Býráð – *seinna viðgerð* | 12.12.2019 | |

**Frágreiðing um málið:**

Deildarstjórarnir íroknað NBH hava gjøgnumgingið raksturin í samband við dagføring av fíggjarætlan 2019. Talan er um tillaging á øllum greinum. Tilsamans eru eykjattanir fyri 4,5 mió.kr., sum tó er nakað lægri, enn tað býráðið fekk upplýst á temafundinum í samband við fíggjarætlanararbeiðið 2020.

Talan um minni inntøkur á umleið 1,1 mió.kr. og umleið 3,4 mió. kr. í meirútreiðslum.

| | Dagførin fíggjarætlan 2019 | | | |
|---|---|---|---|---|
| DIM | Rakstrarstøð | F.ætlan III | Eyka-játtan | Roknsk. |
| | 1.000 kr. | 2019 | | 2019 |
| §1 | Kommunal fyrisiting | 21.880 | 500 | 22.380 |
| §2 | Almanna- og heilsumál | 76.232 | 850 | 77.082 |
| §3 | Børn og ung | 42.876 | 800 | 43.676 |
| §4 | Útbúgving og gransking | 9.331 | 600 | 9.931 |
| §5 | Mentan og frítíð | 12.795 | 77 | 12.872 |
| §6 | Teknisk mál | 20.991 | 734 | 21.725 |
| §7 | Kommunalt virki | 12.586 | 907 | 13.493 |
| | Rakstrarútreiðslur | 196.691 | 4.468 | 201.159 |

Í samband við íløgur er talan um tvær játtanir. Til kirkjugarðin 50.000 kr. og til renovatión -flyting av endurnýtsluni- 1,0 mió.kr.

**Lógargrundarlag:**
Kommunulógin

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmæli:**
Mælt verður til, at fíggjarnevndin samtykkir hesar eykajáttanir.

**Fíggjarnevndin 26. november 2019**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 21-11-2019.

**Klaksvíkar Býráð 28. november 2019**
Tilmælið frá FíN 26-11-2019 einmælt samtykt.

## 152/19
## 19/00892-51 Fíggjarætlan 2020 - Klaksvíkar Býráð

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 26.11.2019 | 126/19 |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 28.11.2019 | 152/19 |

**Frágreiðing um málið:**

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Karmurin fyri fíggjarætlan 2020 hjá Klaksvíkar kommunu hevur verið viðgjørdur á tveimum temafundum, ávikavist fyri rakstur og íløgur. Síðan varð uppskot til fíggjarkarm lagt fyri nevndirnar til nágreinliga útgreining av rakstri og raðfesting av íløgum.
Á niðanfyri standandi talvu er uppsetur tann samlaði fíggjarkarmurin fyri fíggjarætlan 2020 hjá Klaksvíkar kommunu.
Fíggjarætlanin tekur støði í eini lønarframskriving á 4,3 mió.kr., umframt hesa framskriving eru 6,6 mió.kr í meirútreiðslum. Tilsamans verða rakstrarútreiðslurnar 207,6 mió.kr., umframt 7,0 mió.kr. í fíggjarútreiðslum. Samlaði raksturin í 2020 verður sostatt 214,6 mió.kr. Rakstrarúrslitið verður 80,4 mió.kr.

| **Klaksvíkar kommuna** | | | **Fíggjarætlan 2020** | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarstøð** | **F.ætlan III** | **Lønar-framskriving** | **Aðrar útreiðslur/ inntøkur** | **F.ætlan I nevndir** | **2019 I 2020 I** | **2019 III 2020 I** |
| **1.000 kr.** | **2019** | **2020** | **2020** | **2020** | | |
| **Kommunal fyrisiting** | **21.880** | **329** | **517** | **22.726** | **846** | **846** |
| **Almanna- og heilsumál** | **76.232** | **2.531** | **2.317** | **81.079** | **5.286** | **4.847** |
| **Børn og ung** | **42.876** | **806** | **661** | **44.343** | **2.048** | **1.467** |
| **Útbúgving og gransking** | **9.331** | **33** | **749** | **10.113** | **418** | **782** |
| **Mentan og frítíð** | **12.795** | **134** | **363** | **13.292** | **632** | **497** |
| **Teknisk mál** | **20.991** | **370** | **442** | **21.803** | **812** | **812** |
| **Kommunalt virki** | **12.586** | **64** | **1.595** | **14.244** | **1.658** | **1.658** |
| **Rakstrarútreiðslur** | **196.691** | **4.266** | **6.643** | **207.600** | **11.700** | **10.909** |
| **Fíggjarútreiðslur** | **7.600** | **0** | **0** | **7.000** | **-600** | **-600** |
| **Rakstrarútreiðslur tilsamans** | **204.291** | **4.266** | **6.643** | **214.600** | **11.100** | **10.309** |
| **Inntøkur tilsamans** | **-270.000** | **0** | **0** | **-295.000** | **-21.169** | **-21.169** |
| **Rakstrarúrslit** | **-65.709** | **4.266** | **6.643** | **-80.400** | **-10.069** | **-10.860** |
| **Íløgur** | **162.569** | | | **76.400** | **0** | **0** |
| **RLÚ** | **96.860** | | | **-4.000** | | |

Á felags nevndarfundi 9. november -Temafund II- vórðu raðfestar 76,4 mió.kr. í íløgu. Hetta merkir, at RLÚ úrslitið verður 4 mió.kr., og mælt var til, at henda upphædd verður nýtt til avdráttir.

Á niðanfyri standandi talvu eru útgreinaðar raðfestu íløgurnar frá nevndunum. Samlaðu raðfestingarnar eru 76,4 mió.kr. 10,7 mió.kr í íløgustuðli, ið verða førdar yvir rakstur, tá tær eru framdar. Aðrar íløgur eru 65,7 mió.kr.

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

| | |
|---|---|
| *Íløgustuðul* | |
| Húsarhaldsskúlin | 2,0 |
| Mentanarpallur | 8,0 |
| Nólsoyar Pálshúsið | 0,2 |
| Faktorshúsini | 0,5 |
| | 10,7 |
| | |
| *Íløgur* | |
| Á Skúlatrøð | 3,0 |
| Spillivatn/hitaskipan | 2,0 |
| Bláa skýlið | 6,0 |
| Fastognir | 2,5 |
| Vegir íløga | 6,0 |
| Byggibúgving miðbýur | 8,0 |
| Rennibryt | 2,7 |
| Hallirnar | 0,5 |
| Havna- og vinnuøkið | 10,0 |
| Brandbilur (stigabilur) | 3,0 |
| Nýggjur barnagarður | 5,0 |
| Fimleikarahøll | 3,0 |
| Spæliland | 5,0 |
| Kappróðrarneyst | 7,0 |
| Spælipláss | 1,5 |
| Kirkjugarður | 0,5 |
| | 65,7 |

Samanumtikið er uppskot til fíggjarætlan 2020 tí fylgjandi:

| Klaksvíkar Býráð | |
|---|---|
| **Fíggjarætlan 2020** | |
| **1.000 kr.** | **2020** |
| **Inntøkur** | 295.000 |
| **Rakstur** | 207.600 |
| **Rakstraravlop** | **87.400** |
| **Rentustuðul** | 3.600 |
| **Rentur** | 3.400 |
| **Avdráttir** | 4.000 |
| **Íløgur** | **76.400** |

Umframt frammanfyri standandi rakstrar- og íløgukarm skal eisini støða takast til ásetan av skattaprosenti og barnafrádrátti, ið eru 20,75% og 5.500 kr.

**Lógargrundarlag:**
Kommunulógin

**Tilmæli:**
Mælt verður til, at fíggjarnevnd og býráð samtykkja hetta uppskot til fíggjarætlan 2020 hjá Klaksvíkar kommunu. Somuleiðis áseta skattaprosentið og barnafrádrátt.

KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

**Fíggjarnevndin 26. november 2019**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 21-11-2019.

**Klaksvíkar Býráð 28. november 2019**
Atkvøtt varð um tilmælið frá fíggjarnevndini 26. nov. 2019; tað varð einmælt samtykt við 11 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Sostatt er **fíggjarætlan Klaksvíkar Býráðs fyri 2020** samtykt við hesum tølum:

| **Fíggjarætlan 2020** | (*mió. kr.*) |
|---|---|
| Inntøka | 295,0 |
| Rakstur í alt | 207,6 |
| Rakstraravlop | 87,4 |
| Rentustuðul | 3,6 |
| Rentur | 3,4 |
| Avdráttir | 4,0 |
| Eftir til íløgur | 76,4 |
| | |
| *Íløgustuðul* | |
| Húsarhaldsskúlin | 2,0 |
| Mentanarpallur | 8,0 |
| Nólsoyar Pálshúsið | 0,2 |
| Faktorshúsini | 0,5 |
| | 10,7 |
| *Íløgur* | |
| Á Skúlatrøð | 3,0 |
| Spillivatn/hitaskipan | 2,0 |
| Bláa skýlið | 6,0 |
| Fastognir | 2,5 |
| Vegir íløga | 6,0 |
| Byggibúgving miðbýur | 8,0 |
| Rennibreyt | 2,7 |
| Hallirnar | 0,5 |
| Havna- og vinnuøkið | 10,0 |
| Brandbilur (stigabilur) | 3,0 |
| Nýggjur barnagarður | 5,0 |
| Fimleikarahøll | 3,0 |
| Spæliland | 5,0 |
| Kappróðrarneyst | 7,0 |
| Spælipláss | 1,5 |
| Kirkjugarður | 0,5 |
| | 65,7 |
| Samlað úrslit | 0,0 |

Harumframt var einmælt samtykt at taka undir við einum **skattaprosenti** upp á **20,75 %** og einum **barnafrádrátti** upp á **5.500 kr.**

## 153/19
## 13/00759-86 Stuðul til Áhugafelagið Nólsoyar Páll – *eykajáttan, fyrra viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 19.11.2019 | 85/19 |
| 2 Fíggjarnevndin | 26.11.2019 | 123/19 |
| 3 Klaksvíkar Býráð – *fyrra viðgerð* | 28.11.2019 | 153/19 |
| 4 Klaksvíkar Býráð – *seinna viðgerð* | 12.12.2019 | |

**Frágreiðing um málið:**
Samskifti hevur verið við Áhugafelagið um ymisk viðurskifti, har teimum m.a. varð játtað kr. 650.000,- til gøtuna norðanfyri bygningin.

Viðlagdar eru fundarfrágreiðingar 11. juni og 11. november 2019.
Her verður eisini greitt frá, at verkætlanin kemur at kosta millum 6 - 7 mill.
Skal eftir ætlan standa liðugt móti sumri 2020.
Eisini verður sagt frá, at likviditeturin nú er uppbrúktur.

Tryggingarfelag hevur virðismett ognina við trygging fyri eyga og kom í fyrstu syftu til eina meting á 15 mill. Hetta hava teir so samrátt seg niður til 8 mill.

So talan er um eina stásiliga verkætlan og hús.

Tí er ynskiligt frá áhugafelagnum, at kommunan stuðlar verkætlanina í síni heild á 1 mill.
Hetta er ætlað at verða gjørt við eini árligari játtan á kr. 200.000,- yvir fimm ár – *fyrstu ferð í ár*.

Skal hetta fremjast í verki í ár, verður neyðugt at biðja um eina eykajáttan til endamálið.

**Lógargrundarlag:**
- kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
- neyðugt verður at biðja um eina eykajáttan til endamálið

**Tilmæli:**
Mælt verður til:
1. at játtaðar verða kr. 200.000,- til Áhugafelagið Nólsoyar Páll í ár
2. at peningurin verður útvegaður sum eykajáttan
3. at Áhugafelagið Nólsoyar Páll fær eina tilsøgn um stuðul á kr. 200.000,- fýra ár fram
   – *fyrstu ferð í 2020*

KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

**Mentanarnevndin 19. november 2019**
Nevndin tekur undir við tilmælinum frá umsitingini dagfest 12-11-2019.

**Fíggjarnevndin 26. november 2019**
Nevndin tekur undir við MeN 19-11-2019.

**Klaksvíkar Býráð 28. november 2019**
Tilmælið frá FíN 26-11-2019 einmælt samtykt.